# Semingsuppskot

Uppskot til semju millum:

**Heilsuhjálparafelag Føroya**

**og**

**Kommunala Arbeiðsgevarafelagið**

Heilsuhjálparafelag Føroya og Kommunala Arbeiðsgevarafelagið eru vorðin samd um at gera hesar broytingar í sáttmálan, ið var galdandi til 1. oktober 2021.

## Sáttmálaskeið og lønarkarmur

Sáttmálin verður endurnýggjaður fyri tíðina frá 1. oktober 2021 til 1. oktober 2024.

- Tann 1. januar 2022 hækka lønirnar 1,25%
- Tann 1. oktober 2022 hækka lønirnar við kr. 710
- Tann 1. oktober 2023 hækka lønirnar 2,5%

Lønin verður ásett sambært hjáløgdu lønartalvu, har nýtt stig 13 verður sett inn, ið kemur í gildi 1. oktober 2023. Tey sum tann dagin hava verið 2 ár á stig 12, flyta á stig 13.

## § 4. Løn

Broytt stk. 1:

Í stk. 1, verður aftaná "vikuna." sett:

**Flokkingar:**
Heimahjálpari gongur stigini 2 til 8
Heilsuhjálpari gongur stigini 7 til 13

(Heimahjálparar fáa nýtt endastig 8. Broytingarnar í § 4, stk. 1 verða galdandi frá 1. oktober 2023).

Broytt stk. 8:

Í stk. 8 verður orðingin: “3 samanhangandi mánaðir” broytt til “6 samanhangandi vikur”.

**§ 7. Skeið**

Broytt stk. 4:
Stk. 4 verður orðað soleiðis:

**Stk. 4.** Ferðing til skeið, sum liggja aðrastaðni enn vanliga arbeiðsstaðið (sjóvegis og í útlondum), verða 4 tímar lagdir aftrat skeiðstíðini, til ferðing.

**§ 14 Barnsburðarfarloyvi og ættleiðingarfarloyvi**

Broytt § 14:
§ 14 verður orðað soleiðis:

**§ 14 Barnsburðarfarloyvi og ættleiðingarfarloyvi**
Heilsu-/heimahjálpari, ið er við barn, eigur at siga stovninum frá í minsta lagi 3 mánaðir fyri metta føðing.
**Stk. 2.** Heilsu-/heimahjálparin hevur rætt til barsilsfarloyvi við løn 4 vikur undan mettari føðing og í 24 vikur eftir føðing, t.e. 28 vikur tilsamans.
**Stk. 3.** Prógvar heilsu-/heimahjálpari við læknaváttan, at hon er óarbeiðsfør 4 vikur ella fyrr undan mettari føðing, verður hetta roknað sum vanlig sjúka, og heilsu-/heimahjálpari hevur tá rætt til løn undir sjúku. Tá ið 4 vikur eru eftir til metta føðing, verður farið frá løn undir sjúku til barsilsfarloyvi við løn, sbr. stk. 2.
**Stk. 4.** Umframt nevndu sømdir kann heilsu-/heimahjálpari fáa farloyvi við løn alla viðgongutíðina, um hon við læknaváttan prógvar, at tað fyri fostur ella hana sjálva stendst heilsuvandi av at vera í starvinum.
**Stk. 5.** Frá 14. viku eftir føðing kunnu foreldrini býta rættin til barsilsfarloyvi við løn ímillum sín.
**Stk. 6.** Heilsu-/heimahjálparar, ið ættleiða barn, hava rætt til fráveru við løn í upp til 4 vikur áðrenn, tey fáa barnið, og í 24 vikur tilsamans. Foreldrini kunnu býta rættin til fráveru við løn ímillum sín. Rætturin til fráveru við løn er treytaður av, at ættleiðingarmyndugleikin frammanundan hevur gjørt av, at foreldrini, annað ella bæði, skulu vera heima í samband við, at tey fáa barnið. Foreldrini kunnu ikki vera í farloyvi við løn samstundis eftir hesi grein.
**Stk. 7.** Umframt farloyvið nevnt í stk. 2-6, hevur heilsu-/heimahjálpari rætt til farloyvi við ongari løn og uttan at missa starvsaldur soleiðis, at samlaða farloyvistíðarskeiðið tilsamans er 52 vikur eftir føðing ella eftir, at tey hava fingið barnið. Tíðarskeiðini eru samanhangandi, og farloyvi eftir hesi grein skal vera avgreitt í seinasta lagi 52 vikur eftir føðing ella eftir, at tey hava fingið barnið.

## Gildiskoma og uppsøgn

**§ 25 Gildiskoma og uppsøgn**
Hesin sáttmálin er galdandi frá 1. oktober 2021 til 1. oktober 2024, og kunnu partarnir siga hann upp við 3 mánaða freist, tó í fyrsta lagi til tann 1. oktober 2024.

Fyri **Heilsuhjálparafelag Føroya**

*Mary Antonsdóttir, forkvinna*

*Marjun Petursdóttir Jensen, næstforkvinna*

*Svenn Martinsson, nevndarlimur*

*Ragnhild Rasmussen, nevndarlimur*

*Fríðhild Winther, nevndarlimur*

Fyri **Kommunala Arbeiðsgevarafelagið**

*Pauli Trond Petersen, formaður*

*Anita Fuglø, leiðari*